Einar Waag 60 ár:

# Móttøka fyri Einari í Skálanum

**Fríggjadagin 2. februar var móttøka í Skálanum í Klaksvík í Sambandi við at Einar Waag, stjóri í aldargomlu fyritøkuni Føroya Bjór, helt sín 60 ára føðingardag**

MÓTTØKA
*Myndir: Høgni Thomsen*

Móttøkan í Skálanum var væl fyriskipað og hugnalig og nógv fólk nýttu høvið at heilsa upp á føðingardagsbarnið, bæði viðskiftafólk, samstarvsfelagar, vinir og kenningar.

Sum virkin ídnaðarmaður er Einar komin at kenna nógv fólk. Hann hevur verið í fleiri nevndum, eitt nú hevur hann verið í nevndini fyri seym og galvaniseringsvirkið Rógv, í nevndini fyri Smyril Line, í Føroya Ídnaðarfelag og í Føroyagrunninum.

Síðan 1970 hevur Einar verið stjóri á Føroya Bjór. Í hansara leiðslutíð hevur bryggjaríið ment seg frá einum minni virki til eitt nýmótans ídnaðarvirki. Í dag eiga teir størsta partin av øl- og sodavatnsmarknaðinum í Føroyum.

Føroya Bjór ein langt yvir hundrað ár gomul fyritøka, og tað er triðja ætarlið, sum nú rekur fyritøkuna.



*Einar Waag og konan Elisa, dótturin Annika og ommu- og abbadótturin Elisa*



*Heini Waag, varastjóri í Føroya Bjór, heldur røðu*



*Bjørn Kallsø, landsstýrismaður, og konan Hennibeth heilsa upp á føðingardagsbarnið*



*Einar og Torleif Sigurðsson*



*Alex Sólstein og Elisa Waag*





*Ein gamal Føroya Bjór kassi hevur fingið heiðurspláss á borðinum*



*Páll Rasmussen og Einar Waag*